# Oddagrein



*Mynd 1. Sendistova Føroya í Ísrael varð sett á stovn í 2020*

Tørvur er av og á, at greiða nærri frá ymsum viðurskiftum, sum fara fram í Ísrael, ið kunnu hava áhuga í Føroyum. Ísrael er á ymsum økjum annarleiðis enn tey lond, sum vit vanliga samanbera okkum við og har vit hava sendistovur. Sendistovan hevur sett sær fyri, at kunna um hesi viðurskifti. Hetta er fyrsta kunningarrit, sum kemur frá Sendistovu Føroya í Ísrael og hava vit valt at leggja dent á tey viðurskifti, sum vit halda er mest viðkomandi.

Tað, sum sermerkir Ísrael er, at hóast tað búgva út við 10 mió. fólk, so verður heimamarknaðurin mettur at verða ov lítil. Møguleikarnir fyri at kunna útflyta til grannalondini er eisini avmarkaður, tí samhandilin við tey hava sínar serligu avbjóðingar. Tí er vinnan og innovatiónsumhvørvið sera tilvitað um, at marknaðurin er oftani fyrst og fremst uttanfyri Ísrael. Tí eru ísraelskar fyritøkur og innovatiónsumhvørvi lætt at samskifta við og hevur góðar eginleikar at skilja støðuna og møguleikarnir uttanfyri Ísrael. Tað er har teirra gerandisdagur er.




*Mynd 2. Ísrael er umgirt av fleiri grannalondum, men hevur lítlan samhandil við tey. Tí hyggja ísraelar aðrar leiðir.*

Á tí politiska økinum eru nógvar avbjóðingar nú Ísrael hevur verið í kríggj við bæði Hamas í Gaza og Hizbollah í Suðurlibanon í rúma tíð. Hesir báðir felagsskapirnir hava verið stuðlaðir av Iran. Tað er dýrt, at føra kríggj og tað hevur sett síni spor á fíggjarstøðuna í landinum. Nógv fólk í tiltaksherinum eru kallaði inn til hertænastu, sum hevur við sær, at fleiri tænastur o.a. í samfelagnum hava verið darvaða av hesum. Sendistovan hevur eisini merkt hetta, bæði við at ikki kunna útinna sítt vanliga virksemi, eins og lokalt setta starvsfólkið, hevur verið kallað inn til hertænastu.

MEN vápnahvíld fekst í lag við Hizbollah í november í fjør og gísla- og vápnahvildaravtala er nú komin undir land við Hamas. Vápnahvíldaravtalur er fyrsta stig til, at fáa gjørt friðaravtalur. Í hvønn mun hetta fer at eydnast er trupult at meta um, men hildið verður, at útlitini eru rímiliga góð.

Hetta gevur sendistovuni betri virkismøguleikar. Ísrael hevur nógv áhugavert, at bjóða Føroyum, tí gransking og nýmenning eru týðandi øki, sum Ísrael fæst við. Ísrael er millum heimsins fremstu á hesum øki. Sjálvt á aliøkinum hevur Ísrael nógv, at bjóða, sum Føroyar kann njóta stóra gleði av. Sum dømi kann nevnast, at fyritøkur o.o. eru í

holt við loysnir innan eitt nú matvøru og havtøkni, sum t.d. fóðurtilsetingarevni til laks (herundir protein avloysaraloysnir), øking av fóðurfaktorinum (FCR), mótstøðu-førisskipan (herundir immunitet fyri laksalús), vitlíkistøkni (AI) til aling og fiskalit.

## Ísrael: Leiðandi tjóð innan innovatión

Gjøgnum fleiri ár hevur Ísrael ment eitt dynamiskt umhvørvi fyri innovatión, við at seta í verk eina røð av átøkum fyri at stuðla vinnuligari gransking og menning. Proaktivi innovatiónspolitikkurin hjá stjórnini hevur havt við sær góð úrslit, og hevur staðfest Ísrael sum ein tann fremsta nýskapanarmiðdepilin í heiminum. Landið er eyðkent við sínum sterka íverksetaraanda, stóru íløgunum í gransking og menning og framkomnu vísindaligu granskingarførleikum. Innovatiónsmyndugleikin í Ísrael fylgir áhaldandi við gongdini í innovatiónsumhvørvinum, og lagar sín politikk og sínar stuðulsskipanir eftir tørvi.

Ísrael er heimstaður hjá nógvum nýstovnaðum fyritøkum, og sendistovan hevur fokus á at finna tær, sum eru í tráð við mál okkara og sum bæði gagnar føroysku og ísraelsku fyritøkunum. Eisini hava fleiri stórar fyritøkur bæði granskingar- og menningardeildir í Ísrael. Microsoft hevur t.d. eina slíka deild við 3.000 starvsfólkum, sum burturav fáast við gransking og menning. Intel hevur tilsamans 11.700 starvsfólk, harav 8.000 starvast burturav við gransking og menning.

- Sambært frágreiðing hjá World Economic Forum um kappingarførið, so hevur Ísrael støðugt verið millum 10 tey mest nýskapandi londini í øllum heimin.
- Frágreiðingar hjá OECD vísa, at bruttoinnlendis útreiðslurnar hjá Ísrael til gransking og menning eru 5,8% av BTÚ, sum er tað hægsta í heiminum, samanborið við miðaltalið hjá OECD á 2,7%.




***Mynd 3**. Myndin til vinstru Myndin omanfyri vísir íløgurnar til gransking og menning millum ymsar tjóðir, við serligum denti á samlaðu nýtsluna í mun til BTÚ og tann partin, sum er fíggjaður av almennu myndugleikunum. Ísrael er fremst við størstu íløgunum til gransking og menning, svarandi til 5,4% av BTÚ, og byggir í stóran mun á privata fígging, har bert 9,6% er alment fíggjað (niðari partur av myndini). Í mun til hetta hava lond sum Frakland og Týskland, sum nýta umleið 3% av BTÚ til gransking og menning, ein størri part fíggjaðan av almenna geiranum - 31,4% í Fraklandi og 27,8% í Týsklandi. Hetta vísir, hvussu ymiskt tjóðir raðfesta og skipa stuðulin til nýskapan og tøknilig frambrot.*

Nevnast kann at ísraelski parturin í 2023 er øktur til 6,3 % av BTÚ.

Til samanberingar, so nýtir Føroyar 1,5% av BTÚ til gransking og menning. Vanligt hevur hetta ikki verið gjørt upp í Føroyum, men í fjør fingu vit loksins sett tøl og prosent á, hvussu nógv varð brúkt til gransking og menning (Les meir um hetta her).

## Møguleikar hjá Sendistovu Føroya í Ísrael

Sendistova Føroya í Tel Aviv varð sett á stovn í 2020 og hevur síðani havt ein týðandi leiklut í at styrkja tvílandaviðurskiftini og millum Føroyar og Ísrael. Sendistovan arbeiðir við at fremja samstarv á ymiskum økjum, eitt nú á handils-, mentanar- og vinnuøkinum. Ein partur av hesum arbeiði er at hyggja nærri at møguleikunum í sambandi við føroyskan fisk og sjófeingi, ið hevur stóran týdning fyri bæði búskapin í Føroyum og matvørumarknaðin í Ísrael.

Fiskainnflutningshagtølini fyri Ísrael í 2023 vísa greitt, at Ísrael hevur ein stóran eftirspurning eftir vørum, sum Føroyar eru sterkar framleiðarar av, eitt nú laks, sild og makrel. Hesin eftirspurningur er vaksandi. Hetta, saman við upplýsingum um nýtsluvanar hjá ísraelsku íbúgvunum, geva eitt gott grundarlag fyri at kanna og útbyggja nýggjar handilsmøguleikar millum londini.

Fiskainnflutningshagtøl fyri Ísrael í 2023, vísa stórt innflutningsvirði:
(Upphæddirnar eru í cif-prísum (Kostnaður, Trygging og Flutningur):

- 399.742.000 USD (~2.895.642.505 DKK) av **laksi**
- 7.919.000 USD (~57.356.834 DKK) av **sild**
- 5.406.000 USD (~39.155.328 DKK) av **makreli**

Laksanýtslan í Ísrael fyri 2023: 29.222.848 kilo fyri árið (uttan roykta laks). Hetta svarar til, at hvør ísraeli í miðal etur 3 kg. av laksi um árið.

### Møguleikarnir í KT-vinnuni

Sendistovan hevur harumframt ment eitt netverk innan tøkniøkið í Ísrael og knýtt sambond við áhugaðar partar í Føroyum. Fremsta fokusið hjá sendistovuni er at eyðmerkja nýskapandi tøkni og nýstovnaðar fyritøkur, sum kunnu lagast til tørvin í føroysku vinnuni og sum føroyskar fyritøkur kunnu fáa størst gleði av.

### Møguleikarnir innan innovatión

Tann dynamiska innovatiónsumhvørvi í Ísrael stuðlar uppundir nýhugsan og virkis-vøkstur. Sendistovan sær møguleikar fyri, at føroyski marknaðurin, sum í dag er bundin at fiskavinnuni, kann fjøltáttast við at taka nýggja tøkni til sín og leggja størri dent á innovatión.

Av hesi orsøk hevur sendistovan m.a. lagt fylgjandi ætlan, sum fevnir um at:

- Víðka um netverkið í umhvørvinum innan innovatiónsøkið.
- Vitja innovatiónsmiðstøðir og samskifta við ísraelskar myndugleikar fyri at fáa innlit í væleydnaðar innovatiónstilgongdir.

- Meta um, hvussu hesi viðurskifti kunnu tillagast til at stuðla uppundir vøkstur og fjølbroytni í Føroyum.

### Møguleikarnir innan útbúgving og gransking

Ein av uppgávunum hjá sendistovuni, er eisini at stimbra útbúgvingarligt samstarv millum Ísrael og Føroyar.

Ætlanin á hesum økið er m.a. at:

- Knýta sambond millum granskarar við felags áhugamálum, sum kann verða grundarlag fyri felags granskingarverkætlanum millum stovnar.
- Virka fyri og stuðla skiftislestri, sum hevur til endamáls at styrkja útbúgvingar- og mentanarligu sambondini millum Ísrael og Føroyar.

## Leikluturin hjá sendistovuni

Sum víst á omanfyri, so eru møguleikarnir nógvir í Ísrael og teir eru alsamt vaksandi. Sendistovan hevur ein virknan leiklut í at stuðla føroyskum vinnumøguleikum í Ísrael við at skapa virðismikil sambond millum føroyskar og ísraelskar fyritøkur. Í 2022 skipaði sendistovan fyri eini vinnuferð fyri eini røð av áhugaðum føroyskum fyritøkum. Á ferðini vóru vitjanir hjá viðkomandi fyritøkum, framløgur um ísraelska vinnulívið og B2B tiltøk, sum skaptu karmarnar fyri beinleiðis vinnumenning og netverki. Hetta átak var liður í ætlanunum hjá sendistovuni at gagnnýta ísraelsku marknaðarmøguleikarnar og styrkja handilsviðurskiftini millum Føroyar og Ísrael. Í løtuni verður arbeitt við, at vinna føroyskum fyritøkum øktar møguleikar á ísraelska marknaðinum

### Føroyskur íverksetaraandi og innovatión

Føroyar hava eisini tikið týðandi stig innan innovatión, og sambært Hagstovuni er landið millum tey mest nýskapandi í Evropa. Føroyskar fyritøkur vísa áhaldandi dirvi til at nýta nýggjar og skapandi arbeiðshættir, serliga innan sjóvinnu og alivinnu, sum eru grundsúlurnar í føroyska búskapinum. Tó hava Føroyar eisini verið virknar innan tøkni og menning av nýggjum vinnuvegum.




*Mynd 4. Til vinstru eitt yvirlit yvir, hvussu nýskapandi føroyskar fyritøkur eru í mun til onnur lond í Evropa. Tað sæst, at Føroyar (tann blái stabbin), liggur á einum fimta plássi.*

*Heimild: Hagstovan (meira kann síggjast og lesast her)*

Hóast Føroyar verða mettar sum eitt av teimum mest nýskapandi londunum í Evropa,

serliga innan sjóvinnu og alivinnu, bjóðar Ísrael eina breiðari, meira fjøltáttaða nýskapanarvistskipan. Stóru íløgurnar í gransking og menning í Ísrael, saman við einum sterkum íverksetaraanda, kunnu geva Føroyum týðandi lærdóm. Í Føroyum er nýskapan enn mest knýtt at nøkrum fáum kjarnuvinnum, men við at læra av ísraelskari tilgongd til íverksetan og tøkniliga menning, kunnu Føroyar finna nýggjar møguleikar– serliga innan tøkni og talgildar loysnir, eins og verandi vinnur kunnu fáa gang av slíkum samstarvi við t.d. at flyta seg enn longur fram á leið. Tað er umráðandi at vera varugur við, at tá ið nýggj tøkni ella nýggir arbeiðshættir verða tiknir í nýtslu, kann hetta elva til stórar broytingar í verandi vinnum og broyta verandi arbeiðshættir.

Eitt samstarv millum Føroyar og Ísrael á økjum sum KT-innovatión, ber við sær møguleikar fyri, at føroyskar fyritøkur kunnu læra av ísraelskum royndum innan KT-skipanir. Í einum alt meira talgildum heimi, har ”cyber security” í størri mun verður raðfest, kunnu Føroyar draga fyrimun av hesum royndum til at menna egnar trygdar- og KT-skipanir. Hetta er sera áhugavert og viðkomandi í verandi heimsstøðu, har nógvur ótryggleiki valdar.

## Rækjualing á landi í Skálavík

Eitt dømi um sambond millum Føroyar og Ísrael, har íverksetan er framd, er fyritøkan NordicTide, sum er ein nýggj fyritøka í Føroyum. Fyritøkan fer undir eina burðardygga, landbaseraða framleiðslu av úrvalsrækjum í Føroyum. NordicTide verður rikin í felag av føroyingum og ísraelum og leggur dent á loysnir, sum koma báðum pørtum til góðar, og byggir brúgv millum tøkniliga og vinnuliga netverkið í Føroyum og Ísrael.

Sjálv framleiðslan verður natúrlig og uttan nýtslu av kemikalium ella antibiotika. Hetta er fyri at tryggja føðsluríkar og umhvørvisvinarligar rækjur, við íblástri frá góðu gongdini frá føroyskari laksaframleiðslu, meðan man samstundis skapar arbeiðspláss og dregir íløgur til sín. Toymið handan NordicTide er mannað við føroyskum og ísraelskum serfrøðingum, sum arbeiða út frá felags virðum um samstarv, álit, etikk, professionalismu og umhvørvisábyrgd. Eitt undirliggjandi mál hjá toyminum er at vera eitt dømi um eina væleydnaða "win-win"-verkætlan, ið byggir á tætt samstarv millum Føroyar og Ísrael á vinnu- og tøkniøkinum.

Heilt ítøkiliga ætlar NordicTide at ala rækjur í einum 7.000 fermetrar stórum bygningi í Skálavík á Sandoynni. Hetta átakið stavar frá manglandi feskum rækjum á evropeiska marknaðinum, har eftirspurningurin er stórur, men útboðið lítið. NordicTide samstarvar við ísraelskar samstarvsfelagar, sum hava staðið á odda fyri at menna ein framleiðsluhátt í eini royndarstøð í Ísrael í átta ár. Sermerki við hesi mentu skipanini er tann høgi produktiviteturin á 15kg/m3, sum er alneyðugur til innandura rækjualing.

NordicTide sameinir gransking og serkunnleika úr Ísrael við tøkni, sum er ment í Føroyum. Vegna høgu prísirnar á feskum rækjum á evropeiska marknaðinum væntar fyritøkan ein árligan umsetning á 120-130 mió. kr. Tað fer væntandi at skapa umleið

10-12 arbeiðspláss, sum fevnir um eigararnar sjálvar og starvsfólk til framleiðsluna og aðrar rakstrarfunktiónir. Man væntar, at fulla framleiðslan byrjar 2. ársfjórðing í 2027.

Stovnararnir av felagnum eru: **Amir Yavniely**, forstjóri (CEO), **Olaf Olsen Sundstein**, stjóri fyri virkismenning og rakstur, **Sagy Gulianka**, sølustjóri og leiðari fyri vørumenning, **Dr. Eran Hadas**, KT-leiðari og høvuðsvísindamaður og **Ólavur Thomsen**, serfrøðingur í tøkni- og ídnaðarloysnum.

## Serligar raðfestingar

Sendistovan fer í 2025 at arbeiða enn meira miðvíst við fiskaútflutningi (laks, sild og makrel) úr Føroyum. Hetta er eitt raðfest útflutningsøki, eins og arbeitt verður við ymsum tøkniligum loysnum, sum ísraelskar fyritøkur og stovnar hava ment innan endurnýtslu av vatni, alternativum hættum, at framleiða fóður til alifisk o.a. Somuleiðis verður arbeitt við KT-økinum, har ísraelskar fyritøkur hava fleiri serligar loysnir, sum føroyskar KT-fyritøkur kunnu fáa gleði av, eins og okkara KT-fyritøkur kunnu lata seg kveikja av. Møguleiki fyri samstarvi og netverki skuldi eisini verið til staðar, sum kann verða týðandi táttur í menningini fyri kt-vinnuna í Føroyum. Fleiri føroyskar KT-fyritøkur eru, ið forrita loysnir, sum kundi hugsast, at fyritøkur í Ísrael kundu havt áhuga í at samstarva við. Sendistovan fer m.a. at leggja seg eftir, at arbeiða eftir tilmælunum "Føroysk KT-Vinna", sum varð givið út í sambandi við Vakstrarforum í 2022.

Í tann mun áhugi og møguleikar eru til tess, so ætlar sendistovan í ár at skipa fyri málrættaðum vinnuferðir innan hesi øki í 2025.

Sendistova Føroya í Tel Aviv 16. januar 2025.

**The Representation of the Faroe Islands** in Tel Aviv, 4 Berkowitz st., 6423806 Tel Aviv
email: telaviv@mfa.fo www.mfa.fo
Office: +972 (3) 608 5850